El & Tele bera boð um nýggjar tíðir og tøkni



Rasmus Magnussen er fegin um, at PC World hevur skrivað grein um fyritøku hansara

El & Tele er fyritøka, ið bjóðar heildarloysnir innan el og tele. Fyritøkan starvast innan øki, har tað gongur skjótt, men er hinvegin so langt frammi í oddinum, at blaðið PC-World hevur valt at skriva um nakað av tí, ið El & Tele fæst við. Fyritøkan hevur staðið fyri at binda saman stovn við tráðleysum sambandi, so hesin virkar sum ein, hóast hann húsast í ymsum lonum

TØKNI
Dagfinn Olsen

Kenda blaðið PC-World hevur grein um føroysku fyritøkuna El & Tele. Fyritøkan hevur staðið fyri, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur roynt eina loysn við antennusambandi millum tvær deildir innan teldu og IP-telefonsamband. Hetta er fyrsta roynd av sínum slag í danska ríkinum.

- Tað er stutligt, at eitt blað sum PC-World hevur áhuga í hesum. Men tað er veruliga eisini áhugavert at sleppa at royna seg og at vera við frammi í oddinum, sigur Rasmus Magnussen frá El & Tele um greinina og um áhugaverdu antennuroyndina.

Fyrsta royndin við antennu

PC-World greiðir gjølla frá viðurskiftunum innan føroysk televiðurskifti og nýggju støðuna uttan einkarætt. Dýrt er at leggja kaðal og tí er loysnin við antennum lokkandi, sigur blaðið og kemur síðani inn á fyritøkuna hjá Rasmusi Magnussen.

Blaðið greiðir frá um elinnleggjaran Rasmus Magnussen, ið saman við øðrum eigur fyritøkuna El & Tele. Har hava tey lagt seg eftir loysnum við antennum og fyritøkan er, síðan einkarrætturin á teleøkinum varð tikin av, vaksin sera nógv og er flutt í stásilig hølir á Argjum, har tey 12 starvsfólkini húsast undir góðum umstøðum. Og arbeitt verður støðugt meira innan tøkni, heldur enn vanliga elarbeiðið, sum vit kenna tað.

Stórur dentur verður lagdur á teldutøkni og hevur hetta merkt eitt tætt samstarv við donsku deildina av Ascom. So tætt, at El & Tele gjørdust teir fyrstu at royna eina nýggja teleloysn — AIP 6400 IP-gateway — har alt kann samskifta yvir sama samband, bæði teldutøknin og IP-telesamskifti.

Henda loysn hóskaði sera væl til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, ið hevði keypt nýggj høli. Uppgávan hjá El & Tele var at skapa samband, so nýggja og gamla deildin kundu samstarva, sum var talan um sama hús. Bæði innan telefon og teldunet. Deildirnar eru tveir kilometrar frá hvørji aðrari og tí var antennusamband uppá 2,4 gigahertz sera hóskandi.

Nógv nýtt í luftini

Rasmus Magnussen greiðir frá fyri PC-World, at hetta var ein uppgáva, ið ikki var so torfør. At seta elektronisku útgerðina upp kravdi ikki so nógv, men týdningarmikið er at nýta dygdargóða útgerð, ið hóskar til føroyska veðurlagið. Tí kom loysnin uppá eini 100.00 krónur, men hesin parturin skuldi verið vunnin innaftur í spardum telefonútreiðslum innan hálvtannað ár.

Nógvar antennur senda í luftini yvir Havnini og kann hetta órógva. Men hetta var bøtt um við eini antennu við parabol, ið verjir fyri øðrum óviðkomandi bylgjum.

Blaðið veit víðari at siga, at Rasmus og hansara fólk eru í gongd við at fylla luftina yvir høvuðsstaðnum við meira tøkni. Á hesum økinum er m.a. tað við at henda, at antennuloysnir kunnu væntast til teir borgarar, ið ikki vilja gjalda takstirnar, ið eru galdandi fyri koparnetið.

Næsta ættarlið á veg

Rasmus Magnussen sigur viðvíkjandi greinini í PC-World, at tað er stuttligt, at blaðið hevur áhuga fyri hesi royndini.

Hann leggur tó dent á, at júst heildarloysnir eru partur av hugskotinum við fyritøkuni EL & Tele.

- Vit hava vitan innan el og innan tele. Tí er gamaní at veita heildarloysnir eru smærri og størri fyritøkur. Vit eru heldur ikki so stór, at vit ikki vita hvat hvør ger so kundin fær skjóta tænastu frá okkum og vit hava alt á einum stað, sigur Rasmus Magnussen.

Hann sigur, at hetta, ið tey nú fáast við, er næsta ættarlið innan IP-telesamskifti. Ein blanding av nýggari og eldri tøkni. Men hann ivast ikki í, at sum tíðin gongur, fara vit at síggja meira av hesum, at fólk ogna sær egnar linjur, heldur enn at leiga sær linjur, sum vit annars hava verið von við innan telesamskifti.

Verkhúsið Stíggjur
á Høgabóli í Saltangará
(vardur verkstaður)

Vit verða við á vørumessuni
við ymiskum hondgjørdum
gávum og brúkslutum

Ymiskt úr træ, hyllar, pyntihandklæði og breyðbakkar.
Tøvdir lutir, taskur, pungar, grýtulappar, silkimaling,
brævkort og turrikløð.

Nakað av jólaprýði
Og ymiskt annað

VIT VERÐA Á BÁSI Nr. 17

Í Býin

Felagið Tórshøll
Hetta vikuskiftið spæla
Flúrar
Hart frígjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er
livandi tónleikur
Leygarkvøldið er bingo kl. 20.00
Sjávakapping verður sunnudagin
Nú fleiri ódýrar eindir allar dagar
Felagið Tórshøll Svennagøta 22 Tlf. 31 15 65

LAMBS BUFFET
frígjakvøldið 21/9
leygarkvøldið 22/9
sunnukvøldið 23/9
kl. 18.00-21.30
Stór buffet
Leakligir rætir úr feskum føroyskum lambakjøti
- ostaborð og dessert
kr. 175,-
HOTEL HAFNIA
berð kann bíleggjast
Hotel Hafnia
Áarvegur 4-10 • Pósthólm 187
110 Tórshavn
Tel. 31 33 35 • Fax 31 33 38
E-mail: hafnia@hafnia.fo
www.hafnia.fo

HESA VIKUNA
Hóskvøldið DJ Tummas Gudmundsen
Frígjakvøldið DJ Magnus Zachariasen
60'ara kvøld
ladies night
Leygarkvøldið DJ Magnus Zachariasen

Frígjakvøldið DJ Regin
Ladies Night
ein fyri 1/2 pris
dørnar kl. 8.00
leygarkvøldið DJ Otter
60 ára ajúbilerar
PLATFORM
disco & pub

Matseðilin
Hósdagin 13. sept.: Høsnarungar
Frígjadagin 14. sept.: Kalkun snitzel
Leygardagin 15. sept.: Rullusteik
Mánadagin 17. sept.: Royktur medistarpylsur
Tysdagin 18. sept.: Karbonadur
Mikudagin 19. sept.: Gullash
***
Seinnaparts-TILBOD frá kl. 14.00:
Juniorburgari 19,95
Maxiburgariella
Búffsandwich 25,00
Matstovan í Hoyvík

Kaggin
í vikuskiftinum spælir
Kaggin
www.kaggin.fo

FÓTBÓLTUR Á STÓRSKÍGGJA
Club 20 Café
Frákur búffur
v/chips, salat & whiskeysaða
69,-
Discoteque Club 20
Tingholmsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 58 28
www.club20.fo

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Frígjadagin 14. september
• "Fimmari"
• Opið er frá kl. 17.00
UNDIRHALD
Leygardagin 15. september
• Opið frá kl. 22.00
• Dansur frá kl. 24.00 - 04.00
Jan skipar fyri

Á matarseðlinum
Suppa og breyð 35,-
Sandwich Baguette
kylling & bacon: curry dressing, salat og tomat 45,-
ost & skinka: mineol whip, tomat og bacon 45,-
ost & kalkun: mineol whip, tomat og bacon 45,-
Lasagna v/oksakjøt 49,-
Pitabreyð v/oksakjøt 49,-
v/tunsalat 49,-
Hvørdi mánadur
CAFÉ HATTUR
Tlf. 31 26 25

-Dag eum nátt- -skjótt og gott-
-ALT DØGNIÐ-
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234
Skal tú bíl hýra, so er tað 311234

NÁTT-BUSSURIN
hjá Óssuri Kristiansen
Tlf. 424254
Leið Sørvágur
Leygarkvøldið:
• Tórsh.-Sørvág. kl. 21.45
• Sørvág.-Tórsh. kl. 23.00
• Tórsh.-Sørvág. kl. 04.30
frá City
(Seinasta vegur vil tórshávnarmiðal hjá bussfelli og bygdafólki á vegum eftir og frem)
Onnur kreidi kann bestillast eftir avtalu
Bussamir: Tlf. 227752

NÁTT-BUSSURIN
hjá Óssuri Kristiansen
Tlf. 424254
Leið Vestmanna
Leygarkvøldið:
• Vestm.-Tórsh. kl. 22.00
• Vestm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 24.30
• Vestm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30
frá City
(Keyst verður um Kirkjubø)
Onnur kreidi kann bestillast eftir avtalu
Bussamir: Tlf. 282254